# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Føstulávintsveitsla í 1938



Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Genturnar í 4. millumskúlaflokki halda føstulávintsveitslu heima hjá Esther Rein.

**Aftasta rað f.v.:** Esther Rein, Ingrid Olsen, Ásla Pálsdóttir Hansen (Joensen), Petra Arge (Simonsen) og Jonna Hansen

**Miðraðið f.v.:** Solveig Joensen (Dam), Guðlaug (Gulla) Helmsdal, Margit á Lava Hansen, Lisa Eystberg og Solveig á Lava Hansen

**Fremsta rað** f.v.: Gudrun Djurhuus (Rubeksen), Jenny Simonsen, (Fossaa), Poulina (Minna) Michelsen, Mary Wikkelsøe og Ruth Madsen (Kvívíks-Tummas)

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Ásla P. Joensen*

# Framvegis ónøgd um Landssjúkrahúsið

**Niðurstøðan av einum fundi millum felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum og álitisumboð á Landssjúkrahúsinum er, at teir akuttu trupulleikarnir hjá sjúkrarøktarfrøðingum als ikki eru loystir**

ARBEIÐSUMSTØÐUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Felagið Sjúkrarøktarfrøðingar hevði aftur í gjár fund við álitisfólkini á Landssjúkrahúsinum. Niðurstøðan er heilt greið, at onki ítøkiligt er hent enn, vísir Sjúkrarøktarfelagið á í brævi til leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

- Teir akuttu trupulleikarnir, sum vit hava víst á viðvíkjandi røktartyngdini á Landssjúkrahúsinum, eru als ikki loystir. Har er einki hent. Sjúkrarøktarfrøðingar fáa ikki veitt neyðugu røktina til sjúklingin vegna ov stórt arbeiðstrýst. Hetta hevur við sær samvitskubit og harvið strongd og kann ikki góðtakast, tí sjúkrarøktarfrøðingarnir hava onga ávirkan á hesi viðurskifti.

Víðari skrivar Sjúkrarøktarfelagið í brævi til leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

- Røktartyngdin er enn alt ov stór í mun til talið av sjúkrarøktarfrøðingum. Hetta er nakað vit als ikki kunnu góðtaka, tí tað gongur útyvir sjúklingarnar. Eisini vilja vit gera landsins mynduleikar varugar við tann vaksandi tørvin av sjúkrarøktarfrøðingum, har tað beinanvegin eigur at berast so í bandi, at ein flokkur afturat av lesandi verður tikin inn á hvørjum ári. Sum vit síggja tað, veksur trupulleikin alsamt til tað verra, sigur Sjúkrarøktarfelagið í brævi til leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, skrivar felagið og leggur afturat:

- Viðvíkjandi spurninginum um at geva hægri løn fyri eykavaktir, vil felagið gera vart við, at sáttmálalønin er minsta løn, sum limir felagsins skulu hava. Avtalur, sum LSH ger yvir sáttmálalønina er ein raðfestingarspurningur hjá leiðsluni. Tað er sera vanligt at gera slíkar avtalur á sjúkrahúsum í grannalondum okkara. Hesar avtalur umfata føstu starvsfólkini á sjúkrahúsunum, sum verða motiverað at taka eyka vaktir fyri eina hægri løn, vísir felagið hjá Sjúkrarøktarfrøðingum á.

Brævið til leiðsluna á Landssjúkrahúsinum er undirskrivað av Vár í Gong, forkvinnu í Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum.

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jørna Sólgerð Grettursdóttir Mikkelsen** fer til gravar úr Kirkjugarðskapellinum fríggjardagin klokkan 13.

## Dagurin

**7. februar. Rikard,** deyður umleið ár 720. Enskur kongur, sum gjørdi pílagrímsferð til Róm og Heilaga Landið, men doyði longu á útferðini.

---

# Tøkk



Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu í stóru sorgini, tá ið okkara høgt elskaða dóttir og systir

**Bára Jespersen Olsen**
Tvøroyri

so brádliga varð tikin frá okkum.

Tøkk, øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Eileen, Fróði og Teitur**

---

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at okkara góði pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Nikael S. Thomsen**

andaðist á Landssjúkrahúsinum týskvøldið 5. februar 2008, 91 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Hoyvíkar kirkju leygardagin 9. februar kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Súsanna, Anna, Sølva og Ólavur**

*Í staðin fyri blómur ella krans, kann ein gáva latast Hoyvíkar kirkju.*

---

# Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsem tá

**Jens Thorolf Nolsøe**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til øll, sum hjálptu til á ymiskan hátt við jarðarferðini og ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávu.
Takk tit øll, ið hava vitjað og ringt.

*Familjunnar vegna*
**Jonhild og Petur**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**William Lauritsen**
Sørvágur

andaðist og varð jarðaður.

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til Dávid Johannesen prest, berarar, sangarar og kirkjutænarar. Og til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Ein serstøk tøkk til starvsfólkini á Sýnini fyri røkt og umsorgan.
Tøkk fyri peningagávur til Ellisheimið á Sýnini.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ellin Sofía, Lis og Oddmar**